
Eldar Sætre, forstjóri í Statoil. leggur fram rokniskapin fyri triðja ársfjórðing í morgin. Mynd: Jógvan H. Gardar

# Eru bjartskygdir fyri Statoil-rokniskapinum

**Jógvan Hugo Gardar**

27.10.2015 - 11:43

Oljan.fo

Í morgin leggur Statoil fram sín rokniskap fyri triðja ársfjórðing, og sambært oljugreinarunum Trond Omdal í Pareto Securities og Oddvar Bjørgan hjá Nordea Markets, so kemur stattoil at leggja fram eitt rakstrarúrslit sum kemur at liggja millum 18,4 og 18,5 milliardir norskar krónur. Hetta er meir enn metingar higartil hava sagt, men 40 prosent lægri enn úrslitið fyri sama ársfjórðing í 2014.

Bjørgan sigur í samrøðu við tíðindastovuna NTB at Statoil hevur økt framleivsluna við fýra prosentum, og høvuðsorsøkin til tað er at gassframleiðslan er økt við 22 prosentum orsakað av at Evropa vil hava meir gass, samstundis sum gassframleiðslan á Groningen-økinumí Noðsjónum er minkað.

Statoil leggur fram sín rokniskap í Oslo í morgin.